dag frá degi





Nazi-bøðilin

Fólk plaga at siga, at veruleikin fer ofta yvir hugflogið, men hesin filmurin greiðir gjølla frá tí spennandi og skakandi frágreiðingini um tríggjar bretskar hermenn, sum vórðu sendir til heimland sítt fyri at drepa ríkisverjan Reinhard Heydrich, sum var ráðgevari og møguligur eftirfylgjari hjá Hitler. Hesin filmurin er bygdur yvir bókina »Seven men at Daybreak«, sum Alan Burgess hevur skrivað.

Í Tjekkoslovakínum ræður Heydrich við harðari hond yvir tí hersetta fólkinum. Á høvuðsskrivstovuni hjá teimum sameindu í London halda menn, at hetta er ein vandamikil maður og møguligur eftirkomari Hitlers. Tí sendir høvuðsskrivstovan tríggjar tjekkiskar menn í bretskari tænastu til heimland sítt fyri at drepa Heydrich. Hesin er alla tíðina vardur av SS-hermonnum, og teir tríggir, sum verða blakaðir niður í fallskyggi, leita sær skjól hjá mótstøðumonnunum í Prag, meðan teir leggja morðið til rættis.

Sum sagt er hesin filmurin bygdur á eini veruligari hending, og henda verður roknað at vera ein tann vandamiklasta, men teir tríggir klára tað ella...

Filmurin verður sýndur í Leikhús Bio.

Automatsvararin í Leikhús Bio hevur tlf. 11131.

Maðurin, sem legði av at roykja

Tað er Tage Danielsson, sum hevur gjørt henda film, sum er ein nýggj útgáva av sjónleikinum hjá Dante. Hesir báðir nevndu hava til felags, at teir halda helviti vera mest undirhaldandi.

»Maðurin, sum legði av at roykja« er frásøgnin um Dante, son ein pylsuframleiðara, sum við deyða sín sigur, at sonurin skal arva alt »pylsuríkið« saman við 17 miljónum kr. — við tí treyt, at sonurin heldur upp at við at roykja seinast 14 dagar eftir deyða pápans. Og hetta at roykja er einasta ódygdin hjá Dante. Um Dante ikki heldur upp at at roykja, skal pápabeiggin Knut-Birger Alighieri arva alt.

Og so fylgja vit Dante ídystinum móti nikotininum pg pápabeiggjanum, sum roynir at freista hann.

Reyði tráðurin í filminum er, »at samløgan at ódygdunum er støðug«, og hetta fær keturoykjaran at kasta seg út í nærum allar freistingar, samstundis við at hann fær sær nakrar detektivar at fylgja sær døgnið runt og forða, at hann fellur fyri freistingini at roykja. Sjálvt tá Dante flýggjar til Fraklands fara detektivarnir ikki frá honum, men fáa franskar at fylgja honum.

Filmurin verður sýndur í Leikhús Bio.